## Lítið arbeiðsloysi

Í juli var arbeiðsloysdið í Íslandi 0,9 prosent, og so lítið arbeiðsloysi hevur Ísland ikki havt í einum mánað tey seinastu sjey árini, skrivar Morgunblaðið. Tað er eisini væl minni enn í juli í fjør, tá 1,4 prosent vóru arbeiðsleys. Verður hugt at kynunum báðum, var arbeiðsloysið millum menn 0,7 prosent og millum kvinnur 1,3 prosent í juli. Í sísta mánað fingu 461 ES-borgarar og 37 fólk úr øðrum londum arbeiðsloyvi í Íslandi.

## Fiskivinnan fær minni

Landingarvirðið hjá danska fiskiflotanum fyrra hálvár í ár var tíggju prosent minni enn í sama tíðarskeiði í 2006. Samstundis minkaði nøgdin næstan ein triðing. Tað vísa nýggj tøl hjá matvørumálaráðnum. Har sæst, at landingarvirðið fyrra hálvár var smáar 1,8 mia. krónur, sum vóru umleið 160 mió. krónur minni enn seks teir fyrstu mánaðarnar í fjør, og at nøgdin var 29 prosent minni. Skip, sum fiska til matna, landaðu fyri 103 mió. krónur minni.

# Sjómannadagur setir foku

**- Í byrjanini vistu vit ikki, hvussu fólk fóru at taka undir við einum sjómannadegi, og tí vistu vit heldur ikki, hvussu nógv fólk fóru at koma til tiltøkini. Í fjør høvdu vit eini 4.000-5.000 vitjandi, og verður veðrið til vildar leygardagin, vænta vit enn fleiri fólk hesaferð, sigur John William Joensen, kunningarleiðari**



SJÓMANNADAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

“Onkur má lukta illa fyri, at tú skal kunna lukta væl…”

Jú, so víst hevur roykurin av agni verið eitt av eyðkennunum fyri bryggjukantin í Klaksvík gjøgnum mong mong ár.

Og soleiðis er enn í dag.

Klaksvíkin hevur verið miðstøðin fyri útróðri í Føroyum langt aftur í tíðina.

Tað var borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, sum segði hesi orðini, vit byrjaðu greinina við, tá hann beyð øll vælkomnum á Føroya Sjómannadegi í Klaksvík í fjør.

Tað var ein kona, sum helst helt seg vera eitt sindur finari enn vanliga fiskimannakonan. Ein góðveðursdag kom hon gangandi fram við einum húsum, har maður stóð og egndi, og agnroykurin setti út á geilar.

Tá hon gekk fram við, helt hon fyri, at her luktaði illa av agni!

- Ja, men onkur má lukta illa fyri, at tú skal kunna lukta væl, var útóðrarmaðurin skjótur at siga.

### Útróður og sjómanslív

Í vikuskiftinum fara klaksvíkingar at skipa fyri enn einum stórum tiltaki. Hesaferð er tað Føroya Sjómannadagur, sum nú verður settur á kjøl á triðja sinni. Tey nógvu tiltøkini og kappingarnar eru á skránni leygardagin, men tey fyrstu tiltøkini byrja longu í annaðkvøld við sjómanssøgum og sjómansvísum í Atlantis.

- Útróðrarmenn og teir, sum starvast á báta-og skipsdekki og annars halda nógv til fram við bryggjukantinum, eru sera glaðir fyri hendan dagin. Dagarnar uppundir tiltakið er vanligt, at teir vaska og mála egningarskúrarnar og gera alt so hugnaligt.

Tað sigur John William Joensen, sum er kunningarleiðari í sambandi við sjómannadagin.

- Hesin dagur er serliga ætlaður útróðrarmonnum, fiskimonnum og familjum teirra, sum hava sjólívið so tætt upp at sær. Fólk, sum ikki hava beinleiðis tilknýti til vinnuna, eru sjálvsagt eisini vælkomin at fylgja við í ymisku kappingunum, hoyra frásagnir og síggja framsýningar av ymiskum slagi, sum eru á skránni hesar dagar.

Kunningarleiðarin leggur dent á, at Føroya Sjómannadagur setir fokus á sjómanslívið.

### Lágt í metum

- Tað er eingin loyna, at útróðrarvinnan og fyri so vítt eisini fiskivinnan á landi ikki er so høgt í metum, nú flest øll helst skulu víðari í skúla eftir loknan fólkaskúla.

John Willian sigur, at tað at standa og egna í nógvum førum verður sæð sum ein neyðloysn.

- Men tað eru nógvir ungdómar, sum tjena sær góðar pengar í skúrunum fram við bryggjukantinum, leggur hann aftrat.

Hann vísir annars á, at bæði tey fyrru árini, Føroya Sjómannadagur hevur verið hildin í Klaksvík, hevur undirtøkan fyri degnum verið stór. Fólk eru komin úr ymiskum heraðshornum.

- Í byrjanini vistu vit slett ikki, hvussu fólk fóru at koma, men tað vísti seg, at undirtøkan fyri degnum longu fyrsta árið gjørdist rættiliga stór. Í fjør mettu vit, at talið lá millum 4.000 og 5.000 vitjandi gestir.

John William sigur, at heldur veðrið sær leygardagin, tá ókeypis eisini verður at koyra gjøgnum Leirvíkstunnilin, væntar hann uppaftur fleiri fólk til Klaksvíkar enn í fjør.

### Alt er ókeypis

Men tað er ikki bara tunnilin, sum verður ókeypis leygardagin.

- Øll tiltøkini á Føroya Sjómannadegi eru ókeypis, bæði úti og inni. Einasta, sum fólk noyðast at gjalda fyri, er maturin, tey sjálvi keypa.

Kunningarleiðarin vísir á, at tað, at eingi atgongumerki verða seld, ger eisini, at torført er at siga, hvussu nógv fólk kemur til Sjómannadagin.

- Vit hava eisini roynt at skipað so fyri, at eingin søla er á stevnuøkinum, sum lokkar børnini at keypa góðgæti, kandy, ballónir og annað. Tað er bevíst, at vit hava gjørt tað soleiðis, tí vil ætla, at hetta tiltak ikki neyðturviliga skal nýtast at kosta teimum nakað, sum vilja verða við.

### Dyggir stuðlar

John William sigur, at Føroya Sjómannadagur er væl stuðlaður av nógvum ymiskum fyritøkum og stovnum, harav tær flestu hava eitt hvørt við sjógvin